*Mobil umbyggir boripallin Jack Bates til Atlantsmótið*

# Jack Bates helst fyrsti pallurin sum fer at bora við Føroyar

*Oljufeløgini Mobil, Elf og Lasmo fara í apríl næsta ár undir ein sera týdningarmikla og spennandi oljuboring á djúpum vatni millum Hetland og Føroyar. Boripallurin Jack Bates verður nú umbygdur til hesa stóru uppgávu, og hann verður leigaður so mikið leingi, at hann ætlandi eisini skal kunna brúkast í tí fyrstu boringini hjá Mobil, Statoil og Enterprise í føroyskum øki, sum møguliga verður móti endanum á 1998.*

JAN MÜLLER

Í 1997 verður farið undir at leita eftir nýggjum olju- og gasskeldum fleiri staðni vestan fyri Hetland. Eitt nú fer stóra amerikanska oljufelagið MOBIL undir eina heilt nýggja og spennandi boring á djúpum vatni vestan fyri Hetland í apríl næsta ár. Tað hevur ongantíð verið borað á so djúpum vatni á Atlantsmótinum áður. Talan er dýpi upp til 1000 metrar og meira. Til hesa boring skulu teir brúka boripallin Jack Bates, sum í løtuni verður umbygdur til hesa serstøku uppgávuna.

Talan er um eitt rættuliga kostnaðarmikið projekt, sum setir stór krøv til nýggjastu tøknifrøðina á djúpum vatni. Hetta verður fyrstu ferð, at borað verður á so stórum dýpi vestan fyri Hetland og í einum øki við heilt serstøkum streymviðurskiftum og veðurviðurskiftum annars.

Umframt Mobil eru eisini oljufeløgini Elf og Lasmo við í hesum spennandi projektinum, sum arbeitt hevur verið við í fleiri ár.

Tað er greitt, at royndirnar frá hesi boringini kunnu koma eini komandi boring á djúpum vatni við Føroyar, har umleið tær somu umstøður við streymi ol. eru galdandi, væl við.

Tað verður so helst eisini hesin boripallurin, sum verður ein tann fyrsti, ið fer at bora á føroyskum øki. Mobil hevur leigað hann í nærum 1-2 ár m.a. við tí fyri eygað at kunna bora í føroysku undirgrundini í 1998 saman við Statoil og Enterprise.



*Jack Bates, boripallurin, sum nú skal royna seg á djúpum vatni vestan fyri Hetland og sum um eini tvey ár helst verður tann fyrsti oljupallurin á føroyskum øki*

# Scrabster vil vera oljudepil á Atlants-mótinum



*Verandi havn í Scrabster. Hon skal nú útbyggjast norðureftir*

JAN MÜLLER

Fyrireikingar verða nú gjørdar til at gera Scrabster í Norðurskotlandi til framtíðar oljumiðdepil fyri alt tað nýggja oljuøkið, sum er best kent undir heitinum „Atlantic Frontier" - Atlantsmótið.

Økini vestan fyri Hetland og Orknoyggjar, við Føroyar og vestan fyri Suðuroyggjar (Hebridurnar) eru partur av Atlantsmótinum. Hetta fevnir so eisini um økið kring Rock All og Hatton háslættan.

Tað hevur verið arbeitt miðvíst at byggja út havnina í Scrabster, soleiðis at hon kann hava somu funktión sum Aberdeen og Peter Head hava tað fyri Norðsjógvin. Hesar báðar havnirnar eru sera týðandi útgerðarhavnir fyri alla oljuvinnuna í Norðsjónum.

Men nú mangt bendir á, at økini á Atlantsmótinum verða ein heilt nýggjur oljulandslutur og møguliga koma at loysa Norðsjógvin av í komandi øld, so royna fleiri býir at gerast miðdepil fyri einum komandi virksemi. Og ein teirra er Scrabster, sum nú alment bjóðar seg fram sum oljuútgerðarhavnin fyri alt økið og tá eisini fyri føroyska økið.

Ætlanin er at útbyggja havnina har fyri 30 mill. pund ella umleið 300 mill. kr. Ráðgevarafelagið MAI metir, at oljuídnaðurin fer at spara umleið 410 mill. pund ella umleið 4 milliardir krónur komandi 25 árini við at brúka Scrabster sum útgerðarhavn ístaðin fyri eina útgerðarhavn á eystursíðu Skotlands.

Sparingin kemur bæði frá eini størri djúpshavshavn í Scrabster og frá flogvøllinum í Wick, sum bert er 20 fjórðingar frá Scrabster. Flogvøllurin kann tá verða brúktur sum tyrlustøð fyri virksemið á Atlantsmótinum. Tað mesta er ein spurningur um at vinna tíð - tí tíð er pengar.

Tað fer at taka umleið 18 mánaðir at byggja út havnina í Scrabster.

### Útgerðarhavn

Eisini í Føroyum verður nú tosað um at gera eina útgerðarhavn til komandi oljuvirksemi við Føroyar og eisini at tæna oljuvinnuni sum heild á øllum Atlantsmótinum.

Sama ráðgevarafyritøkan, sum hevur gjørt eina kanning fyri Scrabster hevur gjørt eina kanning fyri Føroya Oljuídnað. Har er niðurstøðan tann, at tað eigur at verða ein og heldur ikki meira enn ein útgerðarhavn í Føroyum.

Fleiri pláss í landinum hava annars sagt seg vilja hýsa eini slíkari útgerðarhavn, teirra millum Havnin, Tvøroyri, Sørvágur og Skálafjørðurin.

Báðar oljukeldur, haðani framleiðsla byrjar í 97 og 98 liggja umleið miðskeiðis millum Føroyar og Skotland, og eygleiðarar í oljuvinnuni rokna við, at tað uttan iva fer at vera stór kapping millum eina føroyska útgerðarhavn og so Scrabster. Spurningurin er tá, hvør kann geva tí bestu og tvs. skjótastu og bíligastu tænastuna.

Í Skotlandi hava teir so gjørt av, at Scrabster verður teirra boð uppá útgerðarhavn fyri Atlantsmótið í Føroyum liggur henda avgerð helst nakað frammi í tíðini, men okkurt bendir á, at ein eigur ikki at drála ov nógv, tí vit harvið kunnu gerast eftirbátur.

Hóast føroyingar við lóg og reglum kunnu áseta, at útlendsk oljufeløg, sum fara at arbeiða á føroyskum øki skulu brúka føroyskar tænastur, so verður tað eisini ein spurningur um kappingarføri. Tvs. tað verður ein spurningur um, hvussu bíliga ein útgerðarhavn í Scrabster kann bjóða sínar tænastur ímóti teimum tænastum, sum kunnu veitast úr Føroyum.